## VIÐMERKINGAR

# Tórshavnar Kommuna eitt kraftsentur

**Bjarti Mohr**
*Fólkaflokkurin*



Fyri bert heilt fáðum árum síðani var avrátt ikki at byggja m.a. Brimil í Føroyum tí tað fór at ovurhita búskapin. Nýggi Smyril mátti fyri alt í verðini ikki gersat liðugur her heima heldur av somu orsøk. Nú er vend komin í, men tíanverri tann skeiva vegin. Arbeiðsloysi veksur og inntøkurnar hjá kommunum, landskassa og føroysku húsarhaldunum eru minnkaðar munandi.

Tórshavnar Kommuna hevur tey seinastu árini tikið hædd fyri hesari gongd við at hava ein varðisligan búskaparpolitik. So at siga øll skuld er goldin niður. Við tí sum stendur inni á bók er kommunan netto skuldarfríð.

Tað góða við hesum er at kommunan er før fyri at seta arbeiði í gongd sum kunnu seta ferð aftur á búskapin. Ìløgur skulu gerast í m.a. skúlar og ellis- og røktarheim. Ein útbygging av havnaøkinum er eisini neyðug skal kommunan fylgja við í kappingini. Umframt hesar íløgur eru nógvar aðrar verkætlanir sum kunnu setast í gongd. Tórshavnar Kommuna er eitt kraftsentur og hesar íløgur koma at hava eina positiva ávirkan á alt miðstaðarøki.

# Kollfirðingar eru svangari eftir grundstykkjum enn rundstykkjum

**Kári Árting**
*Valevni Tjóðveldisfloksins til Býráðsvalið í Havn*



Fyri rúmari tíð síðani frættist um at komunan arbeiddi við einari byggiætlan fyri Kollafjørð. Hetta er skilagott og eisini tiltrongt, tí gamli vegurin, sum er meginæðrin í bygdini er ikki annað enn gamli grúsvegurin, sum upprunaliga var gjørdur til hestavogn. Síðuvegirnir liggja sum eg veit ikki hvat og sýnið er manga staðni ringt. Hetta hóskar ikki til tíðarinnar krøv um ferðslutrygd og nullhugsjón.

Tað eigur at bera til at geva sær stundir, at nýta evni og hugflog fyri at gera eina vælumhugsaða byggiætlan fyri bygdina. Tí tað finnist jú longu ein byggisamtykt fyri bygdina, so tað skuldi ikki verið neyðugt at bíða leingi fyri at fáa avgjørt hvar nøkur hús kunnu standa, uttan at hetta kemur at spolera allar framtíðarætlanir.

Grundstykki hava ikki verið tøk í rúma tíð, og einki røkist fyri nakrari nýggjari útstykking.

Komunan kann sjálvandi vísa á at grundstykki eru til taks í Hoyvík, men tað eru tey so sanniliga eisini í bygdunum Norðanfyri.

Tað kann ikki vera meiningi við samanleggingini, at fólk skulu flyta burtur úr bygdini, tí tá er einki vunnið hjá nøkrum.

# Torir tú at súkkla í býnum?

**Marin Katrina Frýdal**
*valevni Tjóðveldisflokksins til kommunuvalið í Tórshavnar kommunu*



Tosaði við ein suðuroying fyri stuttum, ið nú býr norðanfjørðs. Í prátinum fall tosið á seyðahald í Suðuroynni, ið brýtur nakað frá tí, ið er aðrastaðni í landinum. Tá sigur hann: "Veist tú ikki, at í Suðuroynni hevur seyðurin størri status enn fólkið"? Til hetta svaraði eg: "Og veist tú, hvør hevur hægst status í Havn, jú tað eru bilarnir."

Eftir mínum tykki eiga vit í felag at skipa fyri átøkum, ið kunnu minka um bilatalið í býnum. Kommunan kundi fyriskipað kapping í hesum sambandi; t.d. saman við dagstovnum, skúlum, foreldrum, feløgum, arbeiðsplássum v.m. Sum dømi, kundu tey, ið fingu flest fólk at ganga ella súkkla til arbeiðis, í skúla ella í dagstovn, verið stimbrað við eini viðurkenning, t.d. eini kapping um eina størri peningaupphædd ella eina uttanlandaferð.

Endamálið skuldi verið, á ein jaligan hátt, at fingið minkað munandi um bilatalið inn í býin vanligar arbeiðsdagar.

Góð fyridømi um tílík átøk eru endurskinsátakið hjá Ráðnum fyri ferðslutrygd, "ársins virki" hjá Vinnuhúsinum og "best røkta bygd" hjá Ferðaráðnum.

Eg eri fullvís í, at øll høvdu verið glaðari, um vit minkaðu um ferðsluna í býnum. Bæði tey, ið veruliga hava tørv á at nýta bilin, og somuleiðis tey, ið fara at ganga ella súkkla. Tað er stórur munur á at koma til arbeiðis um morgunin, tá tú á leiðini hevur sagt góðan morgun nakrar ferðir við fólk tú møtir ávegis til arbeiðis. Og ikki um at tala hinar ágóðarnar afturat, nevniliga at bøta um heilsuna, vælveruna og trivnaðin. Hetta er eisini í tráð við ætlanina hjá landsinsmyndugleikunum, ið hava sett betri fólkaheilsu í fremstu røð.

Besti hátturin at læra børnini um ferðsluna er, at tey sjálvi fara út í hana (við vaksnari hjálp, har tað er neyðugt), tí á baksetrinum í bilinum hjá foreldrunum fáa tey onga ferðslufrálæru.

Fólk, ið búgva í miðbýnum, fáa ikki verið til fyri bilum hjá øðrum, ið treingja seg inn á teirra nærumhvørvi. Loysnin á trupulleikanum má tó vera meira munadygg, enn dáragerð býráðsins í Mortanstovubrekkuni. Fyri løtuvinning mátti eisini hesin grøni bletturin dvína, uttan at miðbýurin tó fær eina haldgóða loysn á parkeringstrupulleikunum afturfyri. Eini trý verulig P-hús spjædd í býnum, t.d. eitt í Álakeri, eitt á Skálatrøð og eitt á Frúutrøð, høvdu hinvegin munað nakað. Og, annars, tá tað kann løna seg hjá fuglfirðingum at spreingja tunnlar til at goyma fisk í, mundi tað so ikki lønað seg at gjørt ein P-hús tunnil í Havn.

Og hvussu við at ment bussleiðina til eitt veruligt alternativ til privatkoyringina?

Gongufólk, fólk við barnavognum ella í koyristóli og súkklur mugu eisini hava pláss í Havnini. Spurningin, "Torir tú at súkkla í býnum"? hoyrir ein mangan. Jú, í heimsins minsta høvuðsstaði er hesin spurningur dagsaktuellur.

# Nær ert tú nóg gomul til at vera einsamøll?

**Maud Wang Hansen**
*Býráðsvalevni Tjóðveldisflokksins*



Ein mamma stendur einsamøll við børnunum, ein torfør men livulig støða.

Hon hevur góða útbúgving og gott arbeiði.

Hon er í tí støðu, at hon hevur tørv á ansing til síni børn.

Hon kann ikki siga, at hon onga familju hevur, men rættari, at familjan ikki hevur umstøður fyri, at hjálpa henni, hvørki nú ella seinni.

Hon heldur eisini, at hvørki familjan ella samfelagið "eigur" ábyrgdina av, at ansa hennara børnum.

Hon merkir tíðiliga á børnunum , at tey krevja meira av henni nú pápi teirra ikki er her meir.

Tann saknurin og tær kensluligu kreppurnar ein sjálvsagt skal ígjøgnum eru fyri ein og hvønn tungar at bera.

Hon tekur oftari og oftari frí frá arbeiði tí hon heldur, at børnini eru sjúk ella tí hon kennir seg troytta og móða.

Føroyska samfelagið hevur tørv á hennara hjálp, tí hon hevur útbúgving ið tørvur er á.

Samstundis blívur møguleikin hjá henni minni og minni fyri at hjálpa sínum egnu og síðani samfelagnum.

Tá so talan er um, hvør skal vera tann tíðningarmiklasti persónurin í lívinum hjá hennara børnum, tá hon er til arbeiðis og ikki kann vera tann fyrsta at síggja tað nýggja tey læra og ikki kann troysta tey tá tey fáa ilt ella eru kedd, ja tá er tað ikki líkamikið hvør í ger tað.

Tann harði veruleikin vísti henni, at tá eitt barn í Tórshavnar Kommunu fer í annan flokk, ja so er tað eingin sjálvfylgja, at ansing er til tað. Tá metir man frá Býráðsins síðu, at barnið er nóg stórt til at klára seg sjálvt aftaná skúlatíð, t.v.s. í fleiri tímar dagliga.

Ferðsluruðuleiki, kavi og hálka, rulluskoytur, SMS og hvat man annars kann koma í tankar um, er dagligur kostur hjá hesum børnum, sum tey nú skulu royna at sleppa ígjøgnum snikkaleys.

Børnini eru tað dýrabarasta vit eiga og hava tey rætt til at kenna seg trygg í okkara lítla samfelag , sum fyri tey er stórt og vandamikið um tey skulu ganga ígjøgnum tað uttan eina leiðandi hánd.

Lat okkum vera við til at geva børnum í skúlaaldri virðilig kor og góð og mennandi tilboð saman við dugnaligum vaksnum fólki, sum tekur ábyrgdina av hesi uppgávu í fullum álvara.

# Vanliga frítíðarundirvísing fyri fólk við breki

**Hildur Eyðunsdóttir**
*Býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin í Tórshavnar kommunu*



Ein mamma spyr í lesarabrævi, hví kommunan skal sleppa ókeypis frá, at skipa vanliga frítíðarundirvísing fyri fólk við breki. Hetta er eisini óhoyrt. Sjálvandi skal kommunan skipa fyri eins góðari frítíðarundirvísing til teirra ið bera brek, sum til onnur. Tað kann ikki rættvísgerast, at kommunan ikki hevur skyldu, at geva hesum borgarum somu rættindi sum hon gevur øðrum borgarum.

Tilboðini um vanligt frítíðarvirksemi til menningartarnað, og til teirra ið bera onnur brek, eiga at verða javnstillað við onnur tilboð til frítíðarvirksemi alt fyri eitt. Alt annað er, at gera mismun á borgarum, og tað er ósømiligt.

## Gjald fyri valgreinar

Nú kommunuvalið er lýst, og fleiri vallistar eru almannakunngjørdir, fara vit eins og til undanfarin val at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið fyri valgreinar er hálvur lýsingaprísur.

**Sosialurin**



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Hugnalig móttøka fyri Dánjali Vang

Fríggjadagin, 24. september, skipaði Fuglafjarðar skúli fyri almennari móttøku á Muntra í samband við, at Dánjal Vang, lærari, hevur starvast í fýrati ár við skúlan í Fuglafirði.

Nógv fólk vóru til móttøkuna, sum eisini var ein rættilig hugnaløta.

Á skránni var kórsangur, felagssangur, hornatónleikur, heilsanir og ábit.

Dánjal er føddur, 21. februar 1940 á Tvøroyri, sonur Paula Eliesar Vang av Hamri í Froðba og Onnu Kathrinu, f. Jacobsen úr Sandvík.

Hann var bert 2 ára gamalur, tá ið mamman doyði av sjúku, og sum 57 ára gamal datt pápi hansara oman.

Kona Dánjal, er Kathrina, f. Olsen úr Klaksvík. Børnini hjá teimum eru Joan, Palli og Árni.




*Her heilsar landsstýrismaðurin i mentamálum, Jógvan á Lakjuni, Dánjali Vang á hátíðardegnum*

Dánjal tók realprógv við Tvøroyrar skúla í 1956 og sama summarið, sum hann tók prógvið, starvaðist hann sum krambakallur hjá Nordafar í Føroyingahavnini.

Men Dánjal hevur eisini verið til skips, og í januar 1957 fór hann við íslendskum trolara. Í Íslandi var hann við trolarum og garnaskipi, og hann royndi seg eisini sum egnara.

Um heystið 1957 byrjaði skúlagongdin hjá honum á háskúla í Danmark, og á sumri 1958 stóð hann upptøkuroynd til at byrja á Skive Seminarium, har Dánjal tók læraraprógv á sumri 1962.

Tey fyrstu tvey árini var hann lærari í Danmark, men frá 1. august 1964 varð Dánjal settur sum lærari við Fuglafjarðar skúla, og her hevur hann starvast uttan slit í samfull 40 ár.

Dánjal frá tað skoðsmál, at hann er ein dugnaligur og nærlagdur lærari, sum fer grundiga til verka.

Hann er góður við børnini, og tey eru góð við hann.

Dánjal hevur eitt lætt og positivt sinnalag.

Hann hevur havt fleiri álitisstørv. Hann hevur verið nevndarlimur í FK í Fuglafirði, hevur verið í barnaverndini og í skúlanevndini í fleiri ár.

Dánjal Vang hevur síðan 1997 verið býráðslimur í Fuglafirði.

## Dagurin

**5. oktober. Placidus**, deyður umleið ár 550. Tá Bænadikt úr Nursia bygdi kleystrið Monte Cassino, fekk hann jørð at byggja á frá ríkum rómverja, Tertullus at navni. Placidus var sonur henda rómverja og gekk Bænadikt til handa. Hann kom sjálvur upp í munkaskipanina og eftir boðum Bænadikts bygdi hann eitt kleystur á Sikiloy. Kleystrið varð rænt og lagt í oyði av sjórænarum og Placidus dripin

*Rasmus Rasmussen doyði hendan dagin í 1962.*

# Johanna í Kinn

## - Johanna Johannesen í Fuglafirði varð áttati fimm ár leygardagin 2. okt.

Johanna býr í Toftum í Fuglafirði. Hon var gift við Peter Jacob Johannesen, Petur Jacob hjá Thomas Johan, sum andaðist 1992. Faðir og Peter Jacob vóru brøður, og var hetta barndomsheimið hjá teimum, at Johanna og Peter Jacob giftust inn í og settu føtur undir egið borð undir hesum bitum.

Mamma Johannu andaðist 14 dagar, eftir at hon var fødd. Hon var úr Kinn í Oyndarfirði og giftist við Jógvan Hammer úr Pállsstovu úr Elduvík. Johanna er yngst av seks systkjum og einasta, sum er eftir á lívi. Johanna er uppkallað eftir mammu síni, sum æt Johanna. Fía, sum var ættað úr Hálvmørk, kom í móður stað. Hon var systkinabarn Johannu (mammuna), og vóru góð forhold millum húsfólkið og Fíu. Ein framúr røsk og arbeiðssom kvinna, sum tók húsið upp á seg eftir deyða Johannu.

Johanna og Peter Jacob fingu trý børn. Sólvá, Sunrid og Torkil. Hetta eru fólkini, sum hava verið við til at mynda Toftagarð í meira enn eina hálva øld. Johanna er ein sera fryntlig, fyrikomandi og hjartalig kvinna. Hon dugir stak væl at siga frá, og er orðarík og dugur væl at taka til orðanna. Altíð var tað hugnaligt, tá ið Johanna stakk inn á gólvið á Bakkanum og prátið gekk upp á tað besta um Oyndarfjørð í sínum mannasniði bæði so og so. Móðir og Johanna vóru báðar úr Oyndarfirði og vóru ikki tjúgunda fólk úr ætt.



Johanna ber einbýlisnavnið úr Oyndarfirði við sær. Eingin býtir einbýling fyri tað, hann er verdur og standa húsini í Kinn uppi enn tann dag í dag. Eini hús í ævintýri, skaldskapi og sínum mannalagnum standa nú millum nýmótans bygningar og tala sítt forna mál úr gamlari føroyskari mentan. Her er ein staður, sum dró alt til sín av hugflogi í sevjuvætu í skiftandi árstíðunum, væl sett í minni hjá Johannu frá hesum einbýlingi . Her er frítt og fagurt, og fjallagreinirnar kring fjørðin tráa ikki lívið av tær, men hava sítt yndismál í rytmiskum anda, sum lata upp fyri mongum, og plagar Johanna venda aftur til hesar dagar inni í Kinn, tá ljómin av degnum lýsti inn í eygna-krókarnar á ungum fólkum, og ungmannakætið rumsaðist undir bitunum inni í Kinn.

Ja, ja, Johanna ein dag kom prinsurin úr Fuglafirði og fór um Fuglafjarðarskarð við tær á fljóta hesti sínum, og tit settu tykkum niður í Toftum í Fuglafirði - uppi í Tronganum, men eg má siga, ikki hevur tað verið trongt undir bitunum av tínum lætta sinni, nei, blíð og týð hava tit øll verið. Siður var hjá okkum míni barnaár at stukkið varð inn gólvið jólakvøld eftir kirkjutíð til búgvið nátturðaborð hjá Johannu og Petur Jacob. Hetta vóru góðir dagar og minnisríkar løtur, sum seint verða gloymdar.

Hóast likamliga veik er andin, vit og skil ikki tær beskorið og liggja enn frásagnirnar úr Oyndarfirði enn tann dag tær næst hjartanum. Tá ið prátið dettur inn á Kinnahúsini, livnar mangt forvitnisligt í tínum huga um leiðina heim í bygdina og inn á gólvið hjá Harald í Hálvmørk, har vinkonur tínar búðu. Tá livnar hugurin úr hesum lyndrandi, heimliga, kosmiska umhvørvi, sum tú hevur tikið til tín og goymt og latið víðari til eftirkomararnar. Hetta er tignarligt.

Hetta var bert eitt lítið minnisbrot, sum nú rann mær til hugs á hesum føðingardegi tínum. Hjartaliga til lukku og gott lívskvøld.

**Frits**

# Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæra pápasystir, abbasystir og langabbasystir

**Kerta Magnussen**

andaðist og var jarðað.

Tøkk til prest, kirkjutænara, gravara, berarar, sangarar, familju, vinir, grannar og øll tykkum, sum mintust Kertu og fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Ein serstøk tøkk til Heimarøktina og starvsfólkið á Suðuroyar sjúkrahúsi, ið vóru um hana tað síðstu tíðina.

*Familjunnar vegna*

**Niels Olaf Eyvindsson**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum við blómum, fjarritum, kortum og uppringingum heiðraðu okkum á gullbrúdleypsdegnum 10. september 2004.

*Vinarligar heilsanir*

**Nessie og Sofus Poulsen**
**Aberdeen**